

# Deildarleiðari til serdeildina

## fyri børn og vaksin

Serdeildin fyri børn og vaksin er deild á Almannastovuni, sum veitir ráðgeving um alt landið og arbeiðir í tøttum samstarvi við økisdeildirnar. Starvsøkið hjá deildini fevnir um ráðgeving til børn og vaksin við skerdum førleika og familjum teirra, viðgerð av umsóknum um stuðul og hjálpartiltøk og samstarv við aðrar stovnar, sum veita tænastur til fólk við breki og annað.

Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.

Vit sóknast eftir einum fólki, ið hevur viðkomandi útbúgving, til dømis frá hægri lærustovni, sosialráðgevi ella annað líknandi, hevur kunnleika til almenna fyristiting, góðan kunnleika til kunningartøkni og evnir at orða seg munnliga og skrivliga.

Okkara ynski er, at deildarleiðarin evnar at eggja og menna starvsfólk, hevur góð samstarvsevni og førleika at loysa uppgávurnar á deildini og menna deildina í tráð við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar stovnurin hevur.

Starvið umfatar í høvuðsheitinum ábyrgdina av leiðslu og samskipan av arbeiðnum á deildini og ráðgeving og vegleiðing av familjum, ið hava børn og vaksin, ið bera brek, umframt samstarv við aðrar fakbólkar.

Deildarleiðarin á Serdeildini fyri børn og vaksin verður partur av einum stovni, ið alla tíðina má tillaga seg broytingar í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum liggja í tíðini og í framtíðini. Deildarleiðarin hevur beinleiðis tilvísing til stjóran.

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi fakfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á telefon 35 35 10.

Skrivlig umsókn skal vera Almannastovuni í hendi í sendasta lagi 22. august 2005 kl. 12.

Send umsóknina til:
Almannastovuna
Smyrilsvegur 20
postboks 3096
110 Tórshavn

almannastovan

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo




WWW.SMYRIL-LINE.COM



### Hjallerup Kro

Hjallerup Kro varð bygd í 1858, men er síðani umbygd fleiri ferðir. Gamli stílurin er tó framvegis hin sami. Matstovan býður uppá eina fjøltáttaða matarskrá og nógv gott vín. Hjallerup er uml. 15 km frá miðbýnum í Aalborg.



### Hovborg Kro

Sera hugnalig krógv, ið hevur nógvar vælsmakkandi spesialitetir at bjóða. Góðir møguleikar eru at ganga túrar í vakra umhvørvinum. Kømruni eru sera hugnalig.



### Sabro Kro

Krógvin er frá 1855 og liggur 13 km frá miðbýnum í Århus. Stórur partur av matinum, ið borðreitt verður við, verður gjørdur á staðnum. T.d. roykja tey sjálvi kjøtið og fiskin. Eisini gera tey ost, smør og súltutoy á staðnum.

**Íroknað kostnaðin er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í egnum kamari við wc/bað og sjónvarpi. íroknað 7 gistingar á trimum ymiskum kráum við morgunmati.

Tlf: 34 59 00
Fax: 34 59 50
booking@smyril-line.fo